## Filmur skal selja Grønland

Ein filmur um eina skíðkapping skal nú fáa útlendsk ferðafólk at koma til Grønlands at ferðast. Filmurin "Our Arctic Challenge" er um eina skíðkapping, sum er á Ammassalikoynni í Eysturgrønlandi, og filmurin vakti ans, tá hann bleiv frumsýndur í Keypmannahavn fyri stuttum. Millum áskoðararnar vóru sendiharrar úr fleiri ES-londum, og teir vístu filminum stóran áhuga, sigur ferðavinnustjórin í Ammassalik, Anders Stenbakken, við KNR.



## Skulu sløkkja bilmotorin

Grønlendski landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, Arkalo Abelsen, umhugsar nú at orða eitt lógaruppskot, sum skal áleggja bilførarum at sløkkja motorin, tá teir fara úr bilinum. Landsstýrismaðurin sigur við grønlendska útvarpið, at alt ov nógv fólk í Grønlandi hava tann óvana at lata bilin standa í tómgongd, meðan tey fara inn á posthúsið ella okkurt annað ørindi. Tað gagnar ikki umhvørvinum og má tí steðgast, sigur hann.

# Skúlin er betri enn kan

**Hóast Vestmanna skúli stóð seg hampiliga væl í PISA-undankanningini í fjør, halda næmingarnir í skúlanum ikki, at hann er so vánaligur sum úrslitið vísti.
- Vit hava í øllum førum ein góðan skúla, eingin ivi um tað. Men hann kundi trongt til nógvar ábøtur, siga næmingar í 10. flokki í Vestmanna**



*Vestmanna skúli fekk eitt hampiliga gott úrslit í seinastu PISA-kanningini. Næmingarnir harmast tó um, at so stórur dentur verður lagdur á tað negativa, at ein nærum gloymir alt tað positiva*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PISA-ÚRSLITIÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** Týsdagin kom fyrsta veruliga úrslitið av PISA-kanningini. Eitt úrslit, sum ikki gevur føroyingum nógv at fegnast um ella reypa av.

Fakligu úrslitini fyri føroyska skúlan er framvegis eitt vónbrót, tí í fleiri lærugreinum liggja vit rættiliga nær botnmarkinum.

Hesi somu skelkandi boðini fekst longu ein hóming av, tá úrslitið av undankanningini varð kunngjørt fyri júst einum ári síðani: Kanningin vísti, at føroysku skúlarnir fingu ringan karakter.

Ein av skúlunum, sum lá í ovara enda var Vestmanna skúli. Meðan Kommunuskúlin í Havn fekk 423 og flest stig, var skúlin í Vestmanna á einum fjórða plássi við 415 stigum, saman við skúlunum á Toftum og á Argjum.

- Tað er forbi'i strævið, at ein altíð skal hoyra um, hvussu illa tað stendur til og hvussu vánaligur skúlin er.

- Vit hava í hvussu so er ein góðan skúla og eisini góðar lærarar. Eg haldi, at vit læra nógv, sigur ein næmingur í 10. flokki.

Fyrrapartin í gjár vitjaði Sosialurin í Vestmanna og hitti næmingarnar í 10. flokki. Tveir teirra vóru eisini at hoyra beinleiðis í tíðindasendingini á Rás 2 í middegi í gjár.

### Bara negativt tos

Teir 25 næmingarnir í 10. flokki hava hoyrt alt hetta tosið, sum hesa vikuna er kyknað uppaftur um úrslitið av PISA-kanningini.

- Vit hava hoyrt og lisið um, at skúlin er dumpaður, at hann er sibbi og at tann føroyski skúlin einki nyttar.

- Alt hevur verið sera negativt, men lítið hevur verið at hoyrt til tað positiva, siga næmingarnir, sum eru

> *Alt hevur verið sera negativt, men lítið hevur verið at hoyrt til tað positiva. Vit hava í øllum førum ein góðan skúla (Næmingar í 10. flokki í Vestmanna skúla)*



*10. floks næmingarnir í Vestmanna halda, at tey hava í øllum førum ein góðan skúla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*